# Dollarafallið órógvar

Tað stóra virðisfallið á amerikanska dollaranum ávirkar raksturin hjá nógvum fyritøkum, sum brúka dollaran. Teirra millum er danska fyritøkan Viking, sum er kend fyri sína bjargingarútgerð til skip og bátar. Fyritøkan ætlaði, at umsetningurin skuldi væl upp um milliardina í fjør, men tað gekk ikki. Orsakað av dollarafallinum bleiv hann 966 mió. krónur. Viking hevur nú gjørt av at leggja seg eftir tí veksandi kinesiska marknaðinum.

*Viking Life-Saving Equipment hevur høvuðssæti í Esbjerg (Mynd: JydskeVestkysten)*





*Fleiri enn 300 fólk vóru til Shipping Føroyar 2008, og fólk vóru samd um, at ráðstevnan eydnaðist sera væl*




*Anne Jorunn Møkster er forstjóri í Simon Møkster Shipping*



*Varastjórin í Danmarks Rederiforening, Jan Fritz Hansen, helt, at føroyingar eiga at kunna veksa um sína shippingvinnu*

komin í føroysku FAS-skipanina í 2015.

Stjórin í Sjóvinnudeplinum, Lassi Borðoy, greiddi frá, hvussu føroyingar í verki kunnu vera undirveitarar av tænastum hjá stórum útlendskum reiðaríum.

John Rajani, leiðari á Corporate Finance-deildini hjá Føroya Banka, vísti á, hvussu til ber at keypa eitt heilt reiðarí ella skráseta tað á virðirsbrævamarknaði fyri at fáa meiri kapital.

Varastjórin í Danmarks Rederiforening, Jan Fritz Hansen, staðfesti, at Danmark longu er fremsta shippingtjóð í Evropa, og at danir ætla sær at halda fram at vaksa. Hann helt, at føroyingar eiga eisini at klára at veksa um sína shippingvinnu.

## Fyriskiparar

Fyriskiparar av Shipping Føroyar 2008 vóru Føroya Banki, Sjóvinnudepilin og Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Tey, sum umframt fyriskipararnar stuðlaðu tiltakinum, vóru Team Beredskab, Supply Service, Thor og Mærsk.



*Annfinn V. Hansen legði fram eina røð av tilmælum til landsstýrið um, hvussu FAS kann broytast*



*Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, setti Shipping Føroyar 2008*